Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Jóhannis Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Almennar bussleiðir

Spurningar:

1. Er málsetningur settur um, hvussu nógv fólk skulu nýta almennu bussleiðirnar í Føroyum?
2. Hevur príslegan í dag ávirkan á nýtsluna?
3. Hvørji átøk kundi mann gjørt í stutt tíðarskeið, soleiðis at fleiri fara at nýta almennu bussleiðirnar í framtíðini?
4. Er ætlanin at seta hægri príslegur til útlendsk ferðafólk í verk, nú summarið stundar til?

Viðmerkingar:
Bygdaleiðir hava til uppgávu at flyta borgarar trygt og bíligt í Føroyum, soleiðis at allir borgarar í landinum fáa eina javna og góða tænastu, sum tey m.a. rinda fyri gjøgnum skattin. Tað er upplagt, at hesar tænasturnar eru góðar, tá oljuprísirnir eru methøgir, og brennievnið er sera dýrt.

Vit hava eisini sæð í nýggjari frágreiðing um Strandferðsluna, at nýtslutalið á bussleiðunum bara liggur millum 10 og 40%. Tí er vert at umhugsa, um fleiri átøk kunnu gerast fyri at fáa fólk at nýta almennu bussleiðirnar meira enn í dag.

Kríggið í Evropa hevur gjørt, at prísurin á brennievni eru hækkaður sera nógv. Tí kundi hugsast, at fleiri átøk í eitt avmarkað tíðarskeið kunnu gera, at fleiri fáa sær vanan at nýta tænastuna.

Tí verður hesin fyrispurningurin settur.

Á Løgtingi, 17. mars 2022

Jóhannis Joensen